Marianna Joensen á Eiði:

# Vann 120.000 í Gekkinum

**Seinasta hóskvøld setti Marianna Joensen á Eiði seg framman fyri sjónvarpið at spæla Gekk, eins og hundratals aðrir føroyingar. Munurin á henni og hinum gekkaspælarunum var bara, at tá sendingin var liðug hevði hon vunnið tann stóra Gekkin, og var sostatt vorðin 120.000 kr ríkari**

GEKKAVINNARI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Tað fyrsta eg hugsaði var, um eg hevði vunnið tann stóra ella tann minna Gekkin. Eg fekk so at vita, at eg hevði vunnið 120.000 kr. Eg vildi slett ikki trúgva tí. Eg minnist, at eg spurdi: *Havi EG vunnið 120.000?* Soleiðis greiðir Marianna Joensen frá kvøldinum. Hon fortelur, at eftir sendingina komu fólk inn á gólvið at heilsa uppá hana og ynskja henni tillukku.

– Telefonin gløddi tað kvøldið. Nógv fólk ringdu at ynskja mær tillukku, enntá systkinabørn hjá mammu míni ringdu, og tað fløvaði virkuliga. Tey høvdu sitið sum á nálum og sitið og gníst, tá eg vann. Deiligt at vita, at fólk untu mær pengarnar og gleddust um, at tað var eg sum vann, sigur hon.

Hóast hon ikki sigur seg spæla Gekk so serliga ofta, so hevur hon tó vunnið einaferð áður.

– Í apríl í fjør vann eg eisini í gekkinum. Tá vann eg ælabogan. Og tá haldi eg næstan, at eg var akkurát líka glað sum nú, eg vann pengarnar. Man væntar ikki at vinna, og tí verður man so kløkkur og glaður. Eg haldi ikki, at tað ger mun hvat man vinnur, kenslan er tann sama, greiðir Marianna frá. Hon sigur, at tá hon vann seinast, var akkurát sama lívið. Fólk komu at vitja og tey ringdu allastaðni frá at ynskja tillukku. Og tað hevði líka nógv at siga fyri hana, at fólk gleddust við henni tá, sum nú.

– Tað er ikki ordiliga gingið upp fyri mær enn, at eg havi vunnið. Eg havi ikki nýtt nakað av pengunum enn, men eg vóni at tað fer til okkurt, sum veruliga sæst aftur. Havi hugsað um at nýta tað til umvælingar av húsunum. Vit hava búð her í 25 ár nú, so tað er ymiskt sum treingir til eina umvælandi hond, sigur hon.

– Eg haldi ikki at tilveran broytist nakað, fyri tað um tú vinnur pengar. Eg havi so ikki merkt nakað serligt. Børnini eru kanska blivin eitt sindur spydig, men tað er einki negativt í tí. Herfyri var dótturin á vitjan, og hevði lítla ommusonin við. Hann spýði á sofuna, og eg royndi at turka sum frægast. Men dótturin helt, at eg bara kundi keypa mær eina nýggja sofu, nú eg eri blivin so rík, greiðir Marianna frá og flennir.

– Men eg ætli mær so ikki at oyðsla við pengunum, og havi heldur ikki flippað út uppá nakran sum helst máta. Tað tykist í grundini eitt sindur óveruligt, at eg havi vunnið. Eg haldi næstan, at eg bara fari at hava pengarnar standandi á konto eina tíð, og njóta at teir eru har, sigur hon at enda flennandi.



*Herfyri vann Marianna Joensen fyri aðru ferð í Gekkinum. Fyrru ferð vann hon Ælabogan, hesuferð 120.000 kr.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




VÆLKOMIN TIL

MÓTTØKU

Á DEILDINI Í SANDAVÁGI 28. MAI 2004

Vit gleða okkum at síggja teg og húski
til móttøkuna, sum verður í nýggja bygningi okkara:

28. mai kl. 15.00 til 17.30

Nógv forvitnisligt verður á skránni henda dagin

15.00 Móttøkan byrjar

15.15 Mortan Poulsen, stjóri heldur røðu - og handar gávu

15.30 Klovnurin Gita, gyklarin Ásbjørn og búktalarin Absalon skemta við børnum

Undirhaldstónleikur við Holgar Johannesen, klaver og Katrin Jørgensen, trompet



ANNA HANSEN
Dagligur leiðari



JÓRUN JØRGENSEN
Skrivstovukvinna



JÓHANNA Í HORNI
Skrivstovukvinna

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari


## Tempulljóð í Gøtu

Temple of Sound verður eitt av nøvnunum, sum verða at hoyra á G! festivalinum í juli mánaði. Tað eru teir báðir Neil Sparkes og Count Dubulah, ið báðir vóru við í víðagitna Transglobal Underground, ið standa fyri bólkinum.

Mong halda, at teir vóru upprunin til Trip Hop sjangruna. Temple of Sound blanda saman tað ráa og upprunaliga úr øllum heimspørtum.

## Pól Arni úr All That Rain

Pól Arni Holm er ikki longur sangari í rockbólkinum All That Rain. Partarnir eru vorðnir samdir um at gevast við samstarvinum, og All That Rain heldur fram sum ein trio.

– Orsøkin er sera einkult munurin á monnum, hvussu ymiskir vit eru og hugsa, og hvat vit vilja. Og partarnir blivu tí samdir um at best var at halda áfram uttan Pól Arna, skrivar All That Rain á heimasíðu sínari.

All That Rain heldur fram sum trio, og tað verður gittarspælarin Hans Ravnsfjall, sum aftur fer at royna seg sum sangari. Hann hevur áður verið sangari í bólkinum, umframt at hann spælir gittar.

– Vit hava ikki avgjørt enn um vit fara at leita eftir nýggjum sangara, ella vit bara velja at vera tríggir. Næsta spælingin hjá okkum er um eina góða viku, og vit halda áfram við øllum spælingunum við fullum blussi, siga teir í All That Rain.



# Fjølbroyttar konsertir næstu dagarnar

**Siloakórið og sangbólkurin fara at syngja í Fuglafirði í sunnukvøldið og í Norðurlandahúsinu m hvítusunnuaftan**

KONSERTIR
*Jóannes Hansen*

Næstu dagarnar verður møguleiki at hoyra Siloakórið og sangbólkin Salt syngja tvær ferðir. Talan verður um rættuliga fjølbroyttar sangløtur. Fyrra konsertin verður í Mentunarhúsinum í Fuglafirði nú sunnukvøldið klokkan 20.30, og konsertin í Norðurlandahúsinum verður næsta leygardag, hvítusunnuaftan, klokkan 16.

Siloakórið og sangbólkurin Salt hava fleiri ferðir hildið konsertir seinastu árini. Sangirnir hava andaligt innihald. Felags fyri kór og bólk er, at tey fyri stuttum hava verið í Bretlandi og roynt seg. Í fyrraárið gav Siloakórið fløgu út, og sangbólkurin Salt er farin undir fyrireikingar at geva fløgu út. Ætlanin hjá teimum er at taka upp í summar.

Tá ið sangbólkurin og kórið hava konsert í felag, verður talan um fjølbroytta konsert. Salt syngur a capella ella uttan undirspæl, og hjá Siloakórinum er nógv undirspæl. Tað eru seks sangarar í Salt, og tey hava sjálvi sett flestu løgini út, sum tey fara at syngja. Viðhvørt syngja tey í trimum røddum, og onkra ferðina eru raddirnar seks. Tey, sum manna Eysturoyar bólkin, eru Arnvør á Torkilsheyggi, Paula Jespersen, Elsebeth Lassaberg, Eydna Jacobsen, Óli Kristian á Torkilsheyggi, Jóhan Magnus Kristiansson og Bárður á Lakjuni.

Skráin hjá Siloakórinum er sambært kórleiðaranum, Eyðun á Lakjuni, eitt sindur meiri gospelkend, enn hon plagar at vera. Eitt nú syngja tey løg hjá André Crouch og Oslo Gospel Choire.

Solosangararnir í kórinum eru á konsertunum í Fuglafirði og í Norðurlandahúsinum Bárður á Lakjuni, Rógvi á Lakjuni, Elisabeth Hansen, Karlina Højgaard, Elsebeth Lassaberg og Erla á Torkilsheyggi. Trio syngja Elsebeth Lassaberg, Erla á Torkilsheyggi og Levi á Torkilsheyggi.

Hjá Siloakórinum spælir Gunnar Guttesen tangentar. Pæur Dal-Christiansen spælir guitar, Svend Åge Drewsen spælir bass, og Dánjal Zachariassen situr handan trummurnar.

Atgongugjaldið er bæði í Mentunarhúsinum og í Norðurlandahúsinum hundrað krónur, og hvør konsertin verður umleið tveir tímar.

# Fjølbroytt klassisk konsert í Fríðrikskirkjuni sunnudagin

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Havnarkórið endar sítt virkisár 2003-2004 við konsert í Fríðrikskirkjuni nú *sunnukvøldið kl. 20.00*.

Á skránni verða kórsang-ir eftir W. A. Mozart og Johannes Brahms fyri blandað kór og eisini onkrir fyri kvinnukór. Saman við kvinnunum syngja tær báðar Sanna í Brekkunum og Randi Hansen duett, og solo syngja Petra Iversen og Berghild Poulsen.

Klaverleikarin Jóhannes Andreasen spælir til bæði solosangin og kórsangin, og fylgispæl hava eisini teir tríggir klarinettistarnir Bjarni Berg, Oddur Hentze og Peder Riis-Jensen.

Sum nakað serstakt verður eisini úrvaldur unglingastrúkarabólkur at hoyra. Tað er tann kendi tónlistamaðurin Benny Wilkinson, føringur í móðurlegg, sum her í várhálvuni hevur savnað 11 úrvaldar ungdómar í Havn og eisini av bygd til samanspæl. Umframt saman við kórinum at framføra ta gitnu Mozartperluna Ave Verum, sum konsertin endar við, fer hetta vónríka unglingalið at framføra instrumentasatsir eftir Antonio Vivaldi og Georg Fr. Händel. Orkestrið endar sín leilklut við fyrsta satsi úr "Eine kleine Nachtmusik" eftir W. A. Mozart.

Sum siðvenja við kirkjukonsertum í Føroyum verður ikki atgongugjald, men høvi verður til sjálvboðið at stuðla konsertini fíggjarliga.


Handil í miðbýnum í Havn til sølu



Ítróttarhandilin Sporty í Handilskjarnanum
í Havn verður hervið lýstur til sølu.

Handilin liggur sera væl fyri í nógv vitjaða umhvørvinum við gongugøtuna í høvuðsstaðnum.

Nærri upplýsing fæst við at ringja
tel 311242 ella 26 44 29

Sporty

Sporty • Handilskjarnin • N. Finsensg. 8 • 100 Tórshavn
Tel 312081





vit geva tær betri ráð...

At keypa ella byggja er ein avgerð, ið ávirkar tilveruna mong ár framyvir. Somuleiðis stinga fleiri spurningar seg upp, tá ið tú fert at mynda heimið: Hvar og hvussu vil eg búgva? Hvørjar møguleikar havi eg?

Í FØROYA BANKA kunnu vit veita tær holla ráðgeving, soleiðis at tú kanst taka avgerðir, ið tú kanst liva við.

Tørvar húsunum ábøtur, kunnu vit hjálpa tær at fíggja útbyggingina, nýggja baðirúmið, køkin o.s.fr.

Tað er skilagott at seta seg í samband við okkum, áðrenn tú fert í holt við at leggja ætlanir - soleiðis fært tú vissu fyri, at tú fært røttu fíggingina, og veitst, hvussu hetta fer at ávirka fíggjarstøðu tína. Vit geva tær betri ráð...

FØROYA BANKI